Viðmerking:

# Føroyar móti Danmark

Liðini:
**Føroyar**: Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin.

**Danmark**: Eitt samlað Fólkating, øll tann danska pressan, tann føroyska "avdeilingin" av danska Sosialdemokratíinum, Sambandsflokkurin, Dimmalætting og Sosialurin.

So er gongd komin á samráðinganar um Fullveldið Føroyar, og ikki kann sigast annað enn, at mótstøðan móti okkum er hørð. Danska stjórnin hevur lagt upp til grótharðar samráðingar, men tað er ikki í Danmark, at mótstøðan er harðast. Okkara størsti fíggindi eru vit sjálv ella tann parturin av andstøðuni, sum umboðar afturhaldskreftirnar í Føroyum, nevniliga føroyska "avdeildingin" av tí danska Sosialdemokratíinum og Sambandsflokkurin. Høvdingarnir í hesum flokkum sótu báðir so himmalska glaðir í útvarpinum, tá teir frættu, at danir ikki vilja sleppa okkum og einans ætla at geva okkum eina skiftistíð uppá 3 — 4 ár. Teir søgdu enntá, at teir hildu, at samgongan átti at gevast við samráðingunum beinanvegin. Hetta síðsta vísir bara, at teir eru fullkomiliga óegnaðir at fara niður at umboða Føroyar, tí teir høvdu bara sagt ja og amen til alt, sum Nyrup segði, stungið í sekkin og farið heim. Løgið at Eidesgaard ikki vildi síggja Nyrup fyri tveimum árum síðani. Helst var tað bara spæl fyri gallaríinum og veljarunum.

**Søgan endurtekur seg**
Søgan endurtekur seg, verður ofta sagt, og tað ger hon í so ríkiligt mát nú um dagarnar. Tann sami rotinskapurin, sum varð brúktur móti Sjálvstýrislandstýrinum 1963 - 67, verður nú brúktur aftur. Tað er nevniliga fyri langari tíð síðan avtalað, millum ta føroysku "avdeilingina" av donsku sosialdemokratíinum og móðurflokkin á Fólkatingi, at hetta landsstýrið ikki skal náa nakað á sjálvstýrisleið. Harra Eidesgaard roynir at siga, at hann einki veit. Men tey, sum trúgva hesum, mugu antin hava etið bláseym ella bara vera vanliga naivir javnaðarmenn, sum einans ynskja brøðralag við aðrar javnaðarmenn.

**Hvat skal samgongan gera nú?**
Tað fyrsta teir mugu gera, er at steðga royndini at fáa ta donsku "avdeilingina" av tí danska Sosialdemokratíinum við í Fullveldisgongdina. Teir koma jú ikki við, um so vit fáa eina skiftistíð upp á 1000 ár. Teir vita, sum er, at uttan blokkin, so er ómøguligt at keypa atkvøður við at blaka pening í eystur og vestur og harvið binda okkum tættari at Danmark, so teir framhaldandi kunnu súgva boppuna hjá tí danska móðurflokkinum. Tað er bara at hyggja at øllum uppskotum, sum tingmenn floksins hava lagt fyri tingið tað seinasta árið, og so taka roknimaskinuna og plussa tølini, so sæst eitt stórt reytt tal í botninum.

**Skjótast gjørligt**
Eini ráð til Høgna, Annfinn, Helenu og hini. Haldið áfram í góðum treysti og loysið okkum úr tí danska haftinum, og gerið tað so skjótast gjørligt, best um tað var í morgin. Tað gerst ikki við, um tað kostar eitt sindur, tí tað verður ongantíð dýrari enn prísurin, vit gjalda fyri tann rotinskapin, sum er í brøðralagnum millum danska Sosialdemokratíið og teirra føroyska grenjikór, við Eidisgaard, Strøm og Magnussen, sum høvuðssangarum. Latið teir bara syngja gravarsálmar um neyð og vesaladóm.

**Hetta er okkara land**
Vit vita, at føroyingar eru eitt stolt fólkaslag, sum ynskir at ráða sær sjálvum. Vit vita, at vit hava eitt stórt virði, og tað vita danskir politikkarar eisini. Teir einastu, sum ikki vita, hvat virði okkara vøkru oyggjar hava, eru føroyska "avdeilingin" av danska sosialdemokratíinum og tann altíð svarti Sambandsflokkurin. Ongantíð fyrr hevur tað verið so greitt sum nú, at vit hava brúk fyri eini uppgerð við Danmark.

Nú vilja vit eiga okkara land.

**19. mars 2000**
**Rói Joensen**
**Limur í Unga Tjóðveldinum**

# Tjóðveldisflokkurin móti Javnaðarflokkinum?

*Viðmerking til grein hjá Róa Joensen úr Unga Tjóðveldinum í Dimmalætting týsdagin (og Sosialinum í dag)*

Allarfyrst vil eg siga, at eg haldi brævið hjá tær vera á einum heilt ótrúliga lágum støði! Eg vil eisini gera vart við, at orðavendingar, tú brúkar, mest av øllum fáa meg at hugsa um onkra totaliterismu. (Hvussu tað so kann bera til!)

Fari fyrst at gera vart við »liðini« hjá tær: Føroyar: Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin. Danmark: Alt Fólkatingið, øll tann danska pressan, tann føroyska »avdeilingin« av Sosialdemokratunum, Sambandsflokkurin, Dimmalætting og Sosialurin. Um eg skilji teg rætt, so meinar tú, at bert tey, sum eru á liðnum "Føroyar" eru rættir føroyingar, also eftir tínum tykki fólk, sum elska Føroyar. Har skuldi tú nokk heldur havt skrivað: Helvtin av Fólkaflokkinum, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og nøkur úr Miðflokkinum. Fyri so at fara til liðið »Danmark«, so haldi eg, at tú nokk ert tað, man kallar paranoid, ella hevur »forfylgilsisvanvid"«, sum onkur eisini kallar tað. Haldi ikki, at mær nýtist at forklára meg gjøllari enn hetta!

Síðani tosar tú um, at tað ikki er í Danmark mótstøðan er harðast, nú gongd er komin á samráðingarnar, men at: "Okkara størsti fíggindi eru vit sjálv ella tann parturin av andstøðuni, sum umboðar afturhaldskreftirnar í Føroyum, nevniliga føroyska »avdeilingin« av donsku Sosialdemokratunum og Sambandsflokkurin. Má heilt erligt siga, at eg haldi orðið »fíggindar« vera nokkso løgið at brúka í hesum samanhangi, men hetta er jú bara, sum áður nevnt, eitt av teimum orðunum, sum fær meg at hugsa um totaliterismur. Hetta sigur í hvussu er so mikið, at tú opinbart IKKI heldur tað vera í lagi, at fólk hava ymsar politiskar meiningar.

Tað, sum tú so tosar um, viðvíkjandi »Harra Eidesgaard«, sum tú pástendur fyri langari tíð síðan hevur avtalað við Sosialdemokratarnar á Fólkatingi, at hetta landsstýrið ikki skal náa nakað á sjálvstýrisleið, hatta er bara ov langt úti! Tað er nú einaferð soleiðis, at bæði javnaðarfólk í Føroyum og javnaðarfólk í Danmark eru útgjørd við fornufti, sum ikki verður ávirkað av nøkrum propagandalíknandi, romantiskum og naivum orðingum sum: »Nóg mikið er grulvað, nú fara vit til gongu« , »Nú er tíðin komin til eitt frælst Føroyar« og ikki minst: »Í hjørtum okkara býr frælsi«, sum tit opinbart totalt hava misforstaðið merkingina av.

Síðani kemur tú við einum pástandi um, at Javnaðarflokkurin ikki vil loysa, tí at: »teir vita, sum er, at uttan blokkin, so er ómøguligt at keypa atkvøður við at blaka pening í eystur og vestur.....etc.« Eg má virkiliga siga, at eg ikki ordiliga skilji, hvat tú meinar við, haldi tú mást hava misforstaðið, hvat tað er, sum Javnaðarflokkurin stendur fyri. Hugsa teg nú um, hvør hevur gingið á odda fyri at fáa tær samhaldsføstu skipaninar, vit hava í landinum í dag! Og tað var nú ikki fyri at tekkjast veljarunum, men einkult og greitt tí at hetta er tað, sum Javnaðarflokkurin er stovnaður fyri, stendur fyri, og so sjálvsagt eisini virkar fyri.

Tú meinar eisini, at tað gerst ikki við, um loysing fer at kosta okkum eitt sindur, tað verður so ikki dýrari, enn prísurin vit nú gjalda fyri rotinskapin, sum er í »brøðralagnum millum donsku Sosialdemokratarnar og teirra føroyska grenjikóri við Eidesgaard, Strøm og Magnussen sum høvuðssangarum. Latið teir bara syngja gravsálmar um neyð og vesaladóm«. Fyri tað fyrsta haldi eg tað vera nokkso løgið, at brúka brøðralag sum eitt negativt orð. Fyri tað næsta, haldi eg, at tað er ótrúliga merkiligt, at man, um man ikki er samdur við tykkum, knappliga er í einum »grenjikóri«, og hetta bara tí, at man, sum áður nevnt, brúkar sítt fornuft, sum ikki er ávirkað av tykkara slagorðum. Og vil hetta so siga, um vit meta okkum eftir veljarakanningini, at uml. helvtin av føroysku veljarunum eru røddir í hesum grenjikóri? Haldi at kórið er væl mannað meðni! Dirigenturin má vera heilt ótrúliga góður! Fyri at brúka orðið »ræðumyndir«, sum jú er sera populert tykkara millum, haldi eg, at størsta ræðumynd í tykkara eygum er Javnaðarflokkurin, og hetta bert av tí simplu grund, at flokkurin gongur inn fyri vælferðini hjá fólki, vælferðini hjá øllum fólki, ikki bara teimum, sum eiga somikið nógv, at tey ikki síggja tað sum eina persónliga hóttan, um vælferðin minkar. - Tit vilja bara ikki viðganga, hvussu fatala ávirkan, loysing kann koma at fáa á tann meiniga føroyingin.

Javnaðarflokkurin roynir at vísa á hetta, tí tað stríðir ímóti øllum, flokkurin stendur fyri, men fyri tykkum er hetta bara grenj! Skilji forrestin ikki, hví tit tíma at brúka so nógva orku uppá at spilla Javnaðarflokkin út, um hann er so »rotin«, sum tú sigur! So haldi eg, tað hevði verið lættari at roynt at ignorerað flokkin, tað vildi verið ein meira náttúrlig forsvarsmekanisma!

Tú endar brævið við at siga, at vit føroyingar eru eitt stolt fólkaslag, og vit vita, vit hava eitt stórt virði. Tey einastu, sum ikki vita, hvat virði okkara vøkru oyggjar hava, er Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin. Eg ætli mær ikki at tosa fyri Sambandsflokkin, men vit í Javnaðarflokkinum vita eins væl sum tit, hvat virði okkara land hevur. Vit halda tað eisini vera líka vakurt her, sum tit halda, og ikki minst: VIT ELSKA OKKARA LAND LÍKA SO HØGT SUM TIT! Einasti munurin er, at vit elska fólkið, sum býr her, og ynskja tað besta fyri fólkið. Vit elska ikki bara oyggjarnar við sínum vøkru fjøllum og bláa havi rundanum! - Kærleikin røkkur djúpari, enn tað sum eygað sær! Slagorðið hjá okkum er javnaður, frælsi og brøðralag, og orðið frælsi merkir í okkara verð IKKI at vera loyst úr ríkisfelagsskapinum við Danmark, tað merkir persónligt frælsi, og tá vit meta, at tað persónliga frælsið verður minni, um vit loysa nú, so kunnu vit sjálvandi ikki taka undir við tykkara fullveldistosi! Tað skuldi nú ikki verið so ræðuliga ringt at forstaðið, men tað er tað obinbart fyri tjóðveldisfólk! So lat meg fyri eina sikkurheits skyld enn einaferð sláa fast:

Vit elska Føroyar líka so nógv sum tit, og vit eru líka nógv føroyingar sum tit! Vit eru IKKI landasvíkjarar, okkara kærleiki til Føroyar røkkur bara longri enn til at elska grótið, grasið, havið og seyðin í Føroyum, vit vilja tað besta fyri FÓLKIÐ í Føroyum!

**Ragnhild Olsen,**
**Sandavágur**
**Limur í sosialistiskum ungmannafelag**

# Yvirlýsing frá Fólkaítakinum fyri tjóðfundi

Fólkaítakið fyri tjóðfundi ynskir Føroya landsstýri góðan byr, nú farið verður til samráðingar við donsku stjórnina um at skipa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt ríki við fólkaræði.

Vit eru sannførd um, at samráðingarnar fara at enda við einum góðum úrsliti. Hetta er tí, at tann 14. september 1995 fingu vit 3094, sum eru við í Fólkaítakinum fyri tjóðfundi, bræv frá danska forsætisráðnum. Har varð sagt, at danska stjórnin var hugað at seta í verk ta skipan fyri samstarvi Danmarkar og Føroya millum, sum føroyska heimastýrið ynskti.

Á løgtingsvalinum tann 30. apríl 1998 valdi Føroya fólk ein meiriluta, sum vil at Føroyar skulu gerast eitt sjálvstøðugt ríki við fólkaræði. Demokratisk siðvenja er, at ein heiðurlig andstøða letur sær tað lynda, sum meirilutin av fólkinum tekur undir við á frælsum og óheftum vali, og donsku politisku flokkarnir hava longu boðað frá, at teir í hesum máli boyggja seg fyri fólkaræðisligari siðvenju.

Fólkaítakið heitir á allar føroyingar um at vera við í tí mikla verki, vit nú skulu fara undir. Eftir at evsta valdið í næstan 1000 ár hevur verið uttan fyri oyggjar okkara, fara vit nú at taka lut í altjóða samtarvi á jøvnum føti við onnur ríki. Vit ivast ikki í, at tæri í fólki okkara er so gott, at nýggja skipanin fer at gera tað betri at vera føroyingur úti og heima, og at vit, áðrenn langt er fráliðið, fara at vera ein fyrimynd fyri mong av heimsins londum.

Vit bjóða nýggja túsundárinum vælkomnum við nýggja føroyska ríkinum!

Á Glyvrum tann 16. mars 2000

**Líggjas í Bø**
**Maria Jacobsen**
**Hans Tausen Olsen**
**Eirikur Simonsen**
**Olaf á Stongunum**
**Zakarias Wang**



Í býin Í býin Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Mat-seðilin
Hósdagin 23. mars: Saltkjøt
Fríggjadagin 24. mars: Karrygrýta
Leygardagin 25. mars: Nakkaflak
Mánadagin 27. mars: Hakkibúffur
Týsdagin 28. mars: Revelsbein
Mikudagin 29. mars: Hamburgarryggur
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 25. mars
"HJALMAR-ÓLI" vendir plátum
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

Nýtt: Hvørt fríggjakvøld

Ókeypis salatborð í Rio Bravo
Fríggjakvøld framyvir bjóða vit fram stórt salatborð til okkara viðskiftafólk
Opið í vikuskiftinum:
Fríggjadag: kl. 17.00 til 01.00
Leygardag: kl. 17.00 til 03.00
Vinarliga bíleggi borð í góðar tíð.
RIO BRAVO Tel 319767 RESTAURANT
RIO BRAVO • Tórsgøta 11 • Tel. 319767

Su›uroy

DANSUR VIÐ KLAUS & SERVANTS
í høllini í Vági fríggjakvøldið 31/3
Kostnaður kr. 130,-
Sosialurin - 311820

1905 VB Vágs Bóltfelag

sosialurin
www.sosialurin.fo

Kaggin

Hóskvøldið 23/3
DISKOTEK
-ókeypis atgongd
Fríggjakvøldið 24/3 og leygarkvøldið 25/3
spælir ARIA
Kaggin Kaggin Kaggin
Sosialurin - 311820
www.kaggin.fo

Casablanca Night Club
Tórsgøta 11 • 100 Tórshavn
FRÍGGJAKVØLDIÐ 24. MARS
OPIÐ FRÁ KL. 22.00 - 03.30
DISKO TEQUE
18 ára aldursmark
ÓKEYPIS ATGONGD !
DOUBLE UP ! - TIL KL. 01.00
LEYGARKVØLDIÐ 25. MARS
OPIÐ FRÁ KL. 23.00 - 03.30
DISKO TEQUE
21 ára aldursmark
Regin Egholm
DOUBLE UP ! - TIL KL. 01.00
FAXE - stuðlar
Casablanca Night Club
Tórsgøta 11 • 100 Tórshavn

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

Vilja tygum vi› í
í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur